Juni 2023

betri trygging

Tryggingartreytir

# *Rakstrartap av sjúku ella skaða*

# Rakstrartap av sjúku ella skaða


## Lógargrundarlag 3

## 1.0 Hvør er tryggingartakari 3

1.1 Hvørji eru tey tryggjaðu 3
1.2 Til- og frámelding av tryggjaða 3
1.3 Hvør kann verða fevndur 3

## 2.0 Nær tekur tryggingin við 3

2.1 Hvat fevnir tryggingin um 3
2.2 Hvat er ikki fevnt av tryggingini 3
2.3 Varandi sjúkur 3

## 3.0 Nær kann fyritøkan fáa endurgjald 4

3.1 Fyritreyt fyri endurgjaldi 4
3.2 Karenstíð 4
3.3 Endurgjaldstíðarskeið 4
3.4. Uppathald av endurgjaldi 4

## 4.0 Hvat kann fyritøkan fáa í endurgjaldi 4

4.1 Endurgjaldsmeginreglur 4
4.2 Lønarkostnaður fyri starvsfólkini 5
4.3 Rakstrartap fyri starvsfólkini 5
4.4 Lønarkostnaður og rakstrartap fyri eigarar 5
4.5 Avmarking av endurgjaldi 5
4.6 Tryggingarupphædd 5

## 5.0 Hvussu endurgjaldið verður ásett 5

5.1 Meginreglur fyri útrokning av lønarkostnaði 5
5.2 Meginreglur fyri uppgerð av rakstrartapi hjá fyritøkuni 5
5.3 Kostnaður til grannskoðara 6
5.4 Lutvíst óarbeiðsføri 6

## 6.0 Krøv til skjalprógvan 6

6.1 Serligt fyri endurgjald af lønarkostnaði 6
6.2 Serligt fyri endurgjald av rakstrartapi 6

## 7.0 Upplýsingarskylda 6

7.1 Skylda hjá tryggingartakara og tryggjaða 6
7.2 Samtykki 6
7.3 Broytingar í tryggingarviðurskiftum 7

## 8.0 Almennar treytir 7

8.1 Hámarksfulnaður 7
8.2 Trygging í øðrum felagi 7
8.3 Flyting av trygging og starvsaldri frá øðrum felag 7
8.4 Tryggingin heldur uppat 7
8.5 Broyting av tryggingaravtaluni, -gjaldinum og -treytunum 7
8.6 Gildistíð og uppsøgn av tryggingini 7
8.7 Prístalsjavning 7
8.8 Kærumøguleiki 8

# Rakstrartap av sjúku ella skaða

## Lógargrundarlag

Fyri tryggingina eru galdandi, umframt tryggingarskjalið og hesar tryggingartreytir og viðtøkur felagsins, tær í Føroyum galdandi lógir um tryggingaravtalur og tryggingarvirksemi.

## 1.0 Hvør er tryggingartakari

Tryggingartakari er tann fyritøkan, sum vit hava gjørt tryggingaravtalu við. Fyritøkan skal vera skrásett í Føroyum við einum virknum v-tali.

Tað er fyritøkan, sum fær endurgjald.

**1.1 Hvørji eru tey tryggjaðu**
Tryggjaðir eru teir persónar, sum eru nevndir við p-tali í tryggingarskjalinum. Um ein tryggjaður persónur* verður óarbeiðsførur í minst fýra vikur, og fyritøkan hevur rakstrar-ligan miss av hesum, kunnu vit veita fyritøkuni endurgjald.

***Serligt fyri tryggjaða persónin***
Tann tryggjaði skal samstarva um at venda aftur til arbeiðsmarknaðin so skjótt sum gjørligt. Hetta kann t.d. skipast við samstarvi millum arbeiðsplássið, egnan lækna og okkum.
Harumframt skal tryggjaði persónurin samtykkja, at vit útvega viðkomandi upplýsingar fyri at kunna viðgera skaðan.

**1.2 Til- og frámelding av tryggjaða**
- Ein tryggjaður persónur kann í fyrsta lagi verða fevndur av tryggingini frá tí degi, vit fáa fráboðan um hetta. Tit kunnu ikki melda tryggjaða til tryggingaravtaluna við afturvirkandi megi.
- Vit veita einans endurgjald fyri persónar, sum standa á tryggingarskjalinum, og vit viðmæla, at tit støðugt tryggja tykkum, at tryggingarskjalið er rætt.
- Um ein tryggjaður persónur ikki longur skal verða fevndur av tryggingini, skulu tit boða okkum frá hesum beinanvegin.

**1.3 Hvør kann verða fevndur**
Tryggingin kann einans fevna um persónar, sum eru í starvi hjá fyritøkuni.

## 2.0 Nær tekur tryggingin við

Tryggingin tekur við tann dagin, vit góðkenna umsóknina, sí tó stk. 3.2 um karenstíð.

**2.1 Hvat fevnir tryggingin um**
Tryggingin fevnir um óarbeiðsføri hjá tryggjaða persóninum. Óarbeiðsførið skal standast beinleiðis av, at tann tryggjaði persónurin verður raktur av sjúku ella vanlukkutilburði.
- Við sjúku verður sipað til støður, sjúkueyðkenni, sjúkuavgerð, bágar og eftirsjúkur, sum elva til óarbeiðsføri.
- Við vanlukkutilburð skilst ein brádlig hending, sum elvir til persónskaða og óarbeiðsføri.

**2.2 Hvat er ikki fevnt av tryggingini**
Tryggingin fevnir ikki um óarbeiðsføri, sum beinleiðis ella óbeinleiðis stendst av:
- Sjúkum, sum longu eru, sjúkubregði ella sjúkum, sum tekin vóru um, áðrenn tryggingin kom í gildi.
- Tarni, sum tann tryggjaði upplivir, men sum ikki kann staðfestast av kommunulækna ella viðkomandi serlækna.
- Sjúku ella vanlukkutilburði, sum tann tryggjaði persónurin sjálvur hevur elvt til við vilja ella grovum ósketni.
- Sjálvgivnari kenning ella ávirkan av rúsdrekka, rúsevni og øðrum dusandi evnum.
- Vakurleikaviðgerðum ella fitiskurðviðgerðum.
- Kríggi, krígslíknandi gerðum, brot á uttanveltaða støðu, borgarakríggi, uppreistri, borgarligum ófriði, at hald verður lagt á ognarlutir ella kollvelting.
- Farsótt ella alheimsfarsótt, sum Statens Serum Institut hevur allýst.

**2.3 Varandi sjúkur**
Tryggingin fevnir um varandi sjúkur, varandi støður, varandi bágar ella eftirsjúkur, sum verða staðfestar í tryggingartíðar-skeiðnum.

Varandi sjúkur, støður, bágar ella eftirsjúkur, sum elva til óarbeiðsføri, verða mettar sum ein tryggingartilburður* uttan mun til hvussu ofta óarbeiðsføri stendst av hesum.

***Tryggingartilburður**
Ein tryggingartilburður fevnir yvir eina heildargongd við støði í somu sjúku ella vanlukku.

# Rakstrartap av sjúku ella skaða

## 3.0 Nær kann fyritøkan fáa endurgjald

**3.1 Fyritreyt fyri endurgjaldi**
Tit kunnu fáa endurgjald, tá ið tann tryggjaði persónurin lýkur hesi viðurskifti::

1. Sjúkan ella vanlukkutilburðurin, sum elvir til óarbeiðsføri, skal vera íkomin í tryggingartíðarskeiðnum, og
2. tann tryggjaði skal hava verið til kanning hjá kommunulækna ella viðkomandi serlækna, har mein ella sjúka eru skjalprógvað.

Fyritøkan skal harumframt lúka fylgjandi viðurskifti:

1. Skaðin skal fráboðast okkum skjótast møguligt. Seinking kann hava við sær, at endurgjaldið verður avmarkað ella fellur burtur.
2. Øll krøv um peningaligt endurgjald skulu kunna skjalprógvast, og vit viðmæla, at roknskapur og ráðgeving ísv sjúkameldingina og fíggjarligur missur av hesum verða gjørd av einum góðkendum grannskoðara. Tað ger títt krav greiðari - og skaðan skjótari at viðgera.
3. Krav um endurgjald skal fráboðast í seinasta lagi 12 mánaðir frá fyrsta sjúkradegi hjá tryggjaða persóninum.

**3.2 Karenstíð**
Tryggingin kann í fyrsta lagi fevna um óarbeiðsføri, sum stendst av sjúku, 6 mánaðir aftaná tann dagin, ein tryggjaður persónur verður fevndur av tryggingini.

Óarbeiðsførið hjá tryggjaða persóninum, sum verður staðfest í karenstíðini og heldur fram út um karenstíðina, er ikki fevnt av tryggingini.

Karenstíðin dettur burtur, um tryggingin verður flutt frá øðrum tryggingarfelagi, sum greitt frá í pkt. 8.3.

Tað er ongin karenstíð fyri vanlukkutilburð, sum hendir í tryggingartíðarskeiðnum.

**3.3 Endurgjaldstíðarskeið**
Vit útgjalda endurgjald aftaná tvær samanhangandi vikur við fullum ella lutvísum óarbeiðsføri, tá óarbeiðsførið fer út um fýra vikur.

Endurgoldið verður við afturvirkandi megi, tá ið viðkomandi skjalprógv eru móttikin og viðgjørd.

**3.3.1 Longsta endurgjaldstíðarskeið**
Endurgjaldstíðarskeiðið fyri óarbeiðsføri er í mesta lagi 50 vikur pr. tryggingartilburð, uttan mun til, um óarbeiðsførið heldur fram út um tær 50 vikurnar.

**3.3.2 Óarbeiðsføri fleiri ferðir fyri sama tryggingartilburð**
Verður tann tryggjaði persónurin frískur aftur á leiðini í endurgjaldstíðarskeiðnum, men verður mettur óarbeiðsførur fyri sama tryggingartilburð seinni, verður endurgjaldstíðarskeiðið roknað frá tí upprunaliga fyrsta sjúkradegi.

Pkt. 3.3 og 3.3.1 eru enn galdandi.

**3.3.3 Fylgjur av tryggingartilburði**
Kropsligir og sálarligir bágar ella fylgjusjúkur av eini sjúku, viðgerð av sjúku ella vanlukkutilburði, er ikki grundarlag fyri einum nýggjum tryggingartilburði á hesi trygging.

**3.4. Uppathald av endurgjaldi**
Endurgjaldið heldur uppat í fyrsta lagi av fylgjandi hendingum:

- Tá ið tryggjaði persónurin verður frískur aftur*.
- Um tryggjaði persónurin doyr.
- Um starvsviðurskiftini við tann tryggjaða persónin halda uppat.
- Tann dagin tryggjaði persónurin fyllir 70 ár.
- Um fyritøkan letur aftur.
- Um tryggingin verður søgd upp.

***At verða frískur aftur***
"At verða frískur aftur" skal skiljast soleiðis, at ein er frískur aftur bæði til eitthvørt starv og til tað serstaka starvið.

Er man "frískur aftur til tann breiða arbeiðsmarknaðin" vil tað siga, at tað er møguligt at arbeiða, men kortini ikki tað sama starvið, sum áðrenn.

Er man "frískur aftur til tað serstaka starvið", vil tað siga, at tað er møguligt at arbeiða tað sama starvið, sum áðrenn.

## 4.0 Hvat kann fyritøkan fáa í endurgjaldi

**4.1 Endurgjaldsmeginreglur**
Fyritøkan, ið er skrásett sum tryggingartakari í tryggingarskjalinum, fær endurgjaldið.

Tryggingin fevnir sostatt um tapið hjá fyritøkuni, sum hevur tryggjaða persónin í starvi - og sum fær eitt rakstrartap orsakað av óarbeiðsførinum hjá tryggjaða persóninum.

Endurgjaldið verður gjørt upp eftir tveimum endurgjaldsmeginreglum:

- Kostnaður fyri nettoløn til tann tryggjaða persónin í tíðarskeiðnum, har hesin er lýstur óarbeiðsførur.
- Rakstrartap hjá fyritøkuni, sum avleiðing av einum tíðarskeiði við óarbeiðsføri

# Rakstrartap av sjúku ella skaða

**4.2 Lønarkostnaður fyri starvsfólkini**
Við starvssáttmála um fulla løn undir øllum ella pørtum av sjúkratíðarskeiðnum, endurrindar tryggingin eitt leypandi útgjald, sum svarar til lønarkostnaðin fyri tann tryggjaða persónin, frádrigið sjúkradagpening, sjúkraløn, endurgjald frá øðrum o.s.fr.

**4.3 Rakstrartap fyri starvsfólkini**
Um tað ber til at skjalprógva eitt rakstrartap, sum stendst av óarbeiðsføri hjá tryggjaða persóninum, verður rakstrartapið endurgoldið upp til avtalaðu tryggingarupphæddina fyri tann tryggjaða persónin.

**4.4 Lønarkostnaður og rakstrartap fyri eigarar**
Er tann tryggjaði persónurin eigari av egnari fyritøku, ella finst ongin starvssáttmáli um løn við sjúku, endurrindar tryggingin tað rakstrartap, sum stendst av óarbeiðsførinum hjá tryggjaða persóninum.
Eigarar av Sp/f, ÍVF, P/F ella F.v.a.á, sum arbeiða í egnari fyritøku, kunnu fáa endurgjald fyri ta lønarupphædd, sum verður útgoldin.
Lønarupphæddin verður uppgjørd sum goldin løn við viðbót av skiftisavlopsparti hjá tí óarbeiðsføra persóninum.

**4.5 Avmarking av endurgjaldi**
Endurgjaldið má ongantíð fara upp um veruliga tapið hjá fyritøkuni.

Fyritøkan, sum hevur keypt tryggingina, hevur ábyrgd av at skjalprógva og samstarva við okkum um, at tryggingar-útgjaldið ikki fer upp um tað veruliga tapið hjá fyritøkuni.

**4.6 Tryggingarupphædd**
Hvør einstakur tryggjaður persónur hevur eina tryggingar-upphædd knýtta at sínum p-tali.

Tryggingarupphæddin er persónlig og kann ikki flytast til onnur tryggjað í tryggingarskjalinum.

Tryggingarupphæddin er ein 1. váða upphædd*, og vit gjalda í mesta lagi upp til valdu upphæddina. Undirtrygging verður ikki gjørd galdandi.

Tryggingarupphæddin verður ikki prístalsjavnað.

***** 1. Váðaupphædd***
1. Váðaupphædd merkir, at endurgjaldið kann ongantíð fara upp um ta upphædd, sum stendur á tryggingarskjalinum. Hava tit tryggjað eina upphædd uppá t.d. kr. 20.000 pr. mánað og fáa ein skaða, endurrinda vit í mesta lagi kr. 20.000 pr. mánað, uttan mun til, um talan er um ein skaða á t.d. kr. 50.000 pr. mánað.

**4.6.1 Karens við hækkan av upphæddini**
Um fyritøkan hækkar ta upphædd, sum er knýtt at einum tryggjaðum persóni, er ein karenstíð uppá tríggjar mánaðir eftir, at upphæddin er hækkað.

Fyri óarbeiðsføri sum stendst av sjúku ella vanlukkutilburði og sum verður staðfest í hesum karenstíðarskeiðnum, veitir tryggingin endurgjald sambært upprunaliga ásettu tryggingarupphæddini.

## 5.0 Hvussu endurgjaldið verður ásett

**5.1 Meginreglur fyri útrokning av lønarkostnaði**
Í uppgerðini av endurgjaldi taka vit støði í skjalprógvaða lønarkostnaðinum frá teimum trimum undanfarnu mánaðunum í miðal.

Spardar lønarkostnaðir ella lønarískoyti, t.d. sjúkradagpening, sjúkraløn ella endurgjald frá øðrum, draga vit frá endurgjaldinum.

**5.2 Meginreglur fyri uppgerð av rakstrartapi hjá fyritøkuni**
Rakstrartapið verður uppgjørt sum munurin millum
- tann væntaða og sannlíka nettoumsetningin – frádrigið tað, sum tú væntast nýta til at keypa handilsvørur til víðarisølu, rá- og brúksvørur, hálvvirkaðar vørur, pakki-tilfar til vørur, og
- tann staðfesta nettoumsetningin – frádrigið staðfestu nýtsluna av innkeyptum handilsvørum til víðarisølu, rá- og brúksvørur, hálvvirkaðar vørur, pakkitilfar til vørur, og
- tann sparda kostnaðin og lønarkostnaðin ella lønar-ískoyti, sum t.d. dagpeningur, sjúkraløn ella endurgjald frá øðrum, sum verður drigið frá endurgjaldinum.

Við ”umsetning” skilja vit faktureraðan umsetning uttan mvg, latnan avsláttur, eykaágóða (bonus) og aðra søluminking.

Harumframt fevna vit um neyðugar, rímiligar og skjalprógv-aðar meirútreiðslur til skaðafyribyrgjandi tiltøk, sum eru gjørd fyri at varðveita raksturin hjá fyritøkuni. Hetta kann eitt nú vera útreiðslur til avloysarar ella yvirtíð. Stødd og slag av meirútreiðslum verða avtalað við okkum í hvørjum einstøkum føri.

# Rakstrartap av sjúku ella skaða

Vit kunnu útgjalda meirútreiðslurnar regluliga triðja hvønn mánað. Útreiðslurnar kunnu ikki fara upp um tað rakstrartap, sum annars kundi komið, og tað fevnir bara um tann partin av útreiðslunum, sum hevur ávirkan í fulnaðartíðarskeiðnum.

Fyri at kunna fáa endurgjald skal roknskapurin hjá fyritøkuni vera dagførdur og í samsvari við góða bókhaldssiðvenju.

**5.3 Kostnaður til grannskoðara**
Tryggingin fevnir um rímiligan, neyðugan og skjalprógvaðan kostnað upp til kr. 10.000 pr. mál íroknað MVG til grann-skoðara at brúka til uppgerð av sjúkrarakstrartapinum. Vit skulu frammanundan hava góðkent, at tú nýtir ein grann-skoðara til uppgávuna.

Upphæddin verður ikki prístalsjavnað.

**5.4 Lutvíst óarbeiðsføri**
Um tryggjaði persónurin er lutvíst óarbeiðsførur, verður endurgjaldið roknað út eftir teimum arbeiðstímum, har tann tryggjaði persónurin arbeiðir fulla tíð (svarandi til 37 tímar um vikuna), parttíð ella fáar tímar um vikuna.

Endurgjaldstíðarskeiðið kann tó ongantíð fara upp um 50 vikur, sama um tryggjaði persónurin arbeiðir fulla tíð, parttíð ella fáar tímar um vikuna.

## 6.0 Krøv til skjalprógvan

Til uppgerðina av endurgjaldinum skulu tit skjalprógva, at sjúkan ella vanlukkutilburðurin hevur ávirkað arbeiðsførið hjá tí tryggjaða persóninum. Tað skulu altíð fyriliggja læknalig skjalprógv fyri fulltíðar- ella parttíðar óarbeiðsføri.

Tá ið tit boða okkum frá, geva vit bæði tykkum og tryggjaða persóninum nærri boð um, hvørjar upplýsingar eru neyðugar, fyri at vit kunnu viðgera málið.

Tit og tryggjaði persónurin hava skyldu til at senda okkum tey skjalprógv og tær upplýsingar, sum vit biðja um, fyri at vit kunnu viðgera málið.

Vit gjalda útreiðslurnar fyri tær læknaváttanir, sum vit meta eru neyðugar fyri at viðgera málið.

Vit skulu altíð hava:
- Undirskrivaða samtykkisváttan frá tí tryggjaða persóninum.
- Læknaváttan.

**6.1 Serligt fyri endurgjald af lønarkostnaði**
Tá ið tit boða okkum frá einum kravi um lønarkostnað, tørvar okkum:
- Skjalprógv fyri lønarkostnaðin tríggjar teir seinastu mánaðirnar frá fyrsta sjúkradegi. Harumframt kunnu vit biðja um fleiri upplýsingar, t.d.:
- Starvssáttmála.
- Skjalprógv fyri lønarskyldu.

**6.2 Serligt fyri endurgjald av rakstrartapi**
Tá ið tit boða okkum frá einum kravi um endurgjald, skulu tit senda okkum eina uppgerð yvir rakstrartapið saman við endurgjaldskravinum. Harumframt kunnu vit biðja um fleiri skjalprógv, t.d.:
- Skjalprógv fyri roknskapin hjá felagnum seinastu 12 mánaðirnar undan óarbeiðsførinum.
- Skjalprógv fyri rakstrarætlan hjá felagnum í árinum.
- Skjalprógv, sum ger tað sannlíkt, at óarbeiðsførið hjá tryggjaða persóninum hevur havt beinleiðis ávirkan á rakstrartapið.

Um tørvur er á, at tryggingin veitir útgjald fyri meirkostnað, skulu tit eisini senda:
- Frágreiðing um, at meirkostnaðurin, ið tit hava – eitt nú um tit seta ein avloysara – ikki fer upp um tað rakstrartap, ið kundi tikið seg upp – t.d. um tit ongan avloysara settu fyri skadda persónin.

## 7.0 Upplýsingarskylda

**7.1 Skylda hjá tryggingartakara og tryggjaða**
Sum tryggingartakari hevur fyritøkan skyldu til at geva allar upplýsingar, sum vit meta eru neyðugar fyri at gera av, um og í hvønn mun vit skulu rinda endurgjald. Upplýsingarnar kunnu millum annað vera av roknskaparligum slagi.

Tryggjaði persónurin hevur skyldu til at lata allar upplýsingar, sum vit meta eru neyðugar fyri at gera av um og í hvønn mun, vit skulu rinda endurgjald.

**7.2 Samtykki**
Ein treyt fyri at fáa endurgjald er, at tann tryggjaði persónurin gevur skrivligt samtykki til, at vit savna upplýsingar fyri at viðgera skaðan. Viðkomandi má lata okkum upplýsingar um navn, bústað og telefonnummar hjá sjúkrahúsi, læknum og øðrum viðgerum ella arbeiðsávísingum v.m., sum hava ella fara at fáa kunnleika um heilsustøðu og/ella sjúkramelding hjá tryggjaða.

# Rakstrartap av sjúku ella skaða

Vit kunnu einans savna fleiri læknaligar upplýsingar um óarbeiðsførið við samtykki frá tryggjaða persóninum.

Allar heilsuupplýsingar verða viðgjørdar í trúnaði.

**7.3 Broytingar í tryggingarviðurskiftum**
Tað er týdningarmikið, at tit boða okkum frá, um broytingar koma í tey viðurskifti, sum eru nevnd niðanfyri, tí tað kann hava týdning fyri fulnaðin ella prísin á tryggingini:

- Skeivar upplýsingar í tryggingarskjalinum
- Um fyritøkan flytir
- Broyting í gjaldsbústaðnum
- Broyting í eigaraviðurskiftinum í felagnum
- Um vinnugreinin hjá felagnum broytist
- Um talið av persónum, sum eru tryggjaðir í tryggingarskjalinum, broytist.

Boða tit ikki frá broytingum, sum hava við sær, at tryggingin dýrkar, fáa tit endurgjald, sum svarar til munin millum tann prís, sum er goldin, og tann prís, sum skuldi verið goldin. Harumframt kann vantandi fráboðan eisini hava við sær, at rætturin til endurgjald fellur burtur.

Grundað á broytingarnar gera vit av, um og eftir hvørjum treytum, tryggingin kann halda fram.

## 8.0 Almennar treytir

**8.1 Hámarksfulnaður**
Hámarksfulnaður pr. persón pr. mánað sæst í tryggingar-skjalinum, sum tann avtalaða upphæddin.
Tað kann í mesta lagi rindast endurgjald upp til 100 vikur fyri hvønn tryggjaðan persón í øllum tryggingartíðarskeiðnum, uttan mun til hvussu nógvir tryggingartilburðir henda.

**8.2 Trygging í øðrum felagi**
Hava tit keypt eina trygging við sama váða í einum øðrum tryggingarfelagi, er talan um dupulttrygging, og tit skulu tá boða báðum feløgunum frá sjúku ella vanlukkutilburði.

Um hitt felagið ikki tekur við ella avmarkar endurgjalds-skylduna við dupulttrygging, eru somu undantøk og avmark-ingar galdandi fyri hesa tryggingina. Tað vil siga, at vit og hitt felagið skulu rinda lutfalsligt endurgjald.

**8.3 Um tú flytir trygging og starvsaldur frá øðrum felagi**
Vit bjóða okkum til at yvirtaka trygging av sama slagi, tá tryggingarviðurskiftini við hitt felagið halda uppat. Tað vil siga, at tryggingin skal halda fram hjá okkum frá tí degi, hon heldur uppat hjá fyrrverandi tryggingarfelagnum.

Er slit í tryggingaravtaluni frá tí, at tryggingin í fyrrverandi tryggingarfelagnum helt uppat, rokna vit tryggingina sum nýggja, og karenstíð er galdandi.

**8.4 Tryggingin heldur uppat**
Tá tryggingin heldur uppat, missa tit samstundis rættin til fulnað.

Tryggingin heldur uppat, um:

- Fyritøkan letur aftur
- Fyritøkan fer á húsagang.

**8.5 Broytingar í tryggingaravtaluni, -gjaldinum og -treytunum**
Ger tryggingarfelagið broytingar í tryggingaravtaluni, tryggingargjaldinum ella um tryggingartreytirnar verða broyttar, hevur tryggingarfelagið rætt til at seta nevndu broytingar í verk við 30 daga freist til mánaðarlok.

Vil tryggingartakarin ikki góðtaka, at tryggingargjaldið hækkar ella at tryggingartreytirnar gerast strangari, kann tryggingin sigast upp av báðum pørtum við 14 daga freist.

**8.6 Gildistíð og uppsøgn**
Tryggingin stendur við, til tryggingartakarin ella tryggingar-felagið skrivliga sigur hana upp ein mánað áðrenn høvuðs-gjaldsdag.

Trygging, sum er teknað fyri eitt fleiri ára tíðarskeið, og sum ikki skrivliga verður uppsøgd í seinasta lagi ein mánað, áðrenn tíðarskeiðið gongur út, verður endurnýggjað óbroytt til eitt 1-ára tíðarskeið.

Báðir partar kunnu siga tryggingina upp. Hetta skal vera skrivligt og í seinasta lagi ein mánað, áðrenn tryggingar-tíðarskeiðið endar.

Tá ið ein skaði er staðfestur, kunnu báðir partar siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, tó í seinasta lagi ein mánað eftir at endurgjaldið er útgoldið ella skaðin er avvístur.

**8.7 Prístalsjavning**
Tryggingargjaldið verður prístalsjavnað árliga við brúkara-prístalinum hjá Hagstovu Føroya. Javnað verður tó altíð við í minsta lagi tveimum prosentum í mun til árið fyri. Prístals-javningin verður framd høvuðsgjalddagin.

Heldur útgávan av almenna brúkaraprístalinum uppat, verður tryggingin prístalsjavnað við prístali, ið Betri Trygging ger/góðtekur.

betri trygging

# Rakstrartap av sjúku ella skaða

**8.8 Kærumøguleiki**

Um tit ikki taka undir við avgerð okkara í einum tryggingarmáli, eru tit vælkomin til, í fyrsta umfari, at seta tykkum í samband við okkum aftur. Kann málið verða loyst á henda hátt, er tað tann besta, mest einfalda og skjótasta loysnin fyri báðar partar.

Fleiri upplýsingar um kærumøguleikar eru á heimasíðu okkara www.betri.fo.